# Flutningur beinleiðis úr stóru verð

Við fjølbroyttu siglingarætlan Eimskips er lagamanni at innflyta vørur beinleiðis úr øðrum londum enn Danmark. Hetta er ein avgjørdur fyrimunur fyri føroyskar innflytarar, sum kunnu velja millum enn fleiri veitarar enn fyrr hevur verið gjørt. Á Eimskip siga tey seg fáa alt fleiri fyrispurnnigar um innflutnnig gjøgnum aðrar havnir enn Århus í Danmark. Hetta er tekin um altjóðagerðingina og menningina í føroysku vinnuni. "Liggur nú opin fyri tær heimurin" skrivar mæti høvdundur okkara J. P. Heinesen, og tað er júst tað, sum vit nú síggja.



*Brynjar Viggósson, stjóri*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eimskip siglur beinleiðis uppá fleiri havnir í bæði Europa og Amerika. Í Europa siglur Eimskip millum annað uppá Rotterdam og Hamburg. Hetta eru størstu inn- og útskipingarhavnir í Europa og bindilið millum Europa og hinar heimspartarnar. Tað skal ikki gretta um ikki allur innflutningur til Europa kemur um aðra hesa havnina.

Flutningsfrøðin er vísindagrein fyri seg. Nógv orka verður sett av til at optimera flutningin, tí flutningur er ein stórur kostnaður í flestu vinnum. Tað ræður um at fáa vøruna flutta so skjótt, trygt og bíligt sum til ber, tí í flutningi er tíð pengar. Eisini í Føroyum hevur JIT leisturin (just in time) fest seg, so bindingin í goymslu verður so lítil, sum til ber.

Tann vaksandi millumlandahandilin setir størri krøv til kapasitetin í havnum og eftir vegunum, har serliga vegirnir í Norðureuropa eru hart trýstir, serliga í Týsklandi. Fyri stuttum fingu vit so eisini at vita týska stjórnin leggur eitt avgjald á lastbilar og trailarar uppá 0,95 kr fyri hvønn koyrdan kilometur. Hetta fer at leggja ein part av trafikkinum uttanum Týskland. Vit kunnu ímynda okkum at fleiri vørur, sum í dag koma úr londum vestan og sunnanfyri Týskland, fara at velja aðrar avskipingarhavnir á leiðini, eitt nú Rotterdam.

Flutningurin er í dag samskipaður soleiðis, at marknaðirnir verða allýstir alt størri og størri. Hjá summum fyritøkum er alt Europa ein marknaður, sum síðan verður býtt upp í deilmarknaðir. Hjá øðrum er Skandinavia ein marknaður og hjá uppaftur øðrum eru Føroyar ein marknaður. Tað velst um umsetningin á tí einkulta marknaðinum í mun til samlaðu søluna. Logistikkurin verður samskipaður eftir hesum soleiðis, at flutningurin verður skildur til marknaðirnar í teimum stóru havnunum. Og tá er spurningurin, nær føroyski innflytarin kann fáa sína vøru skilda frá. Tess fyrr tess betur fyri at fækka um millumhandlararnar. Hetta kann í førum vera toført, men tað er ein avbjóðing hjá innflytarunum. Ímyndið tykkum alla framleiðsluna frá Japan og fjarðeystri, sum verður seld í Europa, og eisini finnur veg til Føroya. Henda vøra steðgar á í Rotterdam og Hamburg, har hon verður skild til europeiska marknaðin. Talan er bæði um drúgvar nýstluvørur, sum vinnutól og møblar, og ódrúgvar nýtsluvørur, sum frukt, kjøt og matvørur annars. Tá hevði verið lagamanni at fingið sum mest skilt frá til Føroyar beinan vegin og gjørt leiðina frá framleiðara til brúkara styttri.

## Innflutningur frá europeisku ídnaðarlondunum

Mesta framleiðsla í Týskland liggur í norðara parti av landinum. Fyri framleiðslu í Norður- og Eysturtýsklandi er stutt til Hamburg. Somuleiðis liggur Hamburg á leiðini fyri alla framleiðslu úr Miðeuropu. Samstundis sum miðeuropeisku londini eru við at gerast marknaðir fyri føroyskar fiskavørur og enntá eru millumframleiðarar fyri somu, innflyta vit vørur úr hesum londum. Nógv av framleiðsluni í Miðeuropa fer til støð í umráðnum við Hamburg og Rotterdam, og tí verður flutningur mest optimalur tann vegin.

Somuleiðis er við framleiðsla í Spaniu, Italiu, Fraklandi og Benelux. Flutningsstreymurin er til deplarnar við Rotterdam og Hamburg.

Í Bretlandi er mesta framleiðslan í Miðonglandi. Havnabýðurin Immingham liggur í kjarnanum av hesum ídnaði. Tað liggur tí væl fyri at samskipa flutningin til Føroya henda veg.

Føroyingar keypa í dag mest gjøgnum Danmark og nógvur innflutningur er somuleiðis úr hinum Skandinavisku londunum. Eimskip fermur í ikki færri enn trimum skandinaviskum havnum: Århus, sum er størsti havnabýður í Danmark, Gøteborg, sum er størsti havnabýður í Svøríki og í Frederiksstad, sum liggur beint uttanfyri høvðusstaðin Oslo í Noreg.

## Innflutningur úr Ameriku

Tó at føroyingar ikki innflyta nógv úr Ameriku er áhugin vaksandi fyri hesum framleiðslumarknaði. Alt eftir hvussu støðan hjá dollaranum er verður fiskur fluttur til amerikansku marknaðirnar. Tó merkja vit ein vaksandi eftirspurning eftir framleiðslum úr Amerika. Leiðin úr Ameriku til Føroya er stytt eftir at Eimskip byrjaði sínar rutur tann vegin, har teir ferma aðru hvørja viku.

## Í framtíðini nógvur útflutningur úr øllum londum

Lítið er at ivast í at altjóðagerðin, tann vaksandi tilvitanin av logistikki og ídni føroyinga at verða við á ovastu rók setur krøv til flutningsmynstri. Føroyingar fara at keypa alt meira og meira inn beinleiðis. Fokus verður sett á "core business", og tað, sum liggur uttanfyri, verður outsourca. Hetta er eisini ein trendur vit síggja i dag á Vøruhottellinum og á Frígoymsluni, har Eimskip hevur goysmlu, goymslustýring og innlendis flutning fyri alt fleiri kundar.



*Joel undir Leitinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*




*Siglingarætlan*



# Hestprent í støðugari menning

**Nógv er hent, síðani Jón Hestoy byrjaði Hestprent í leigaðum hølum á Tvøroyri fyri 19 árum síðani. Fyritøkan er farin úr 50 fermetrum á Tvøroyri, til at húsast í 800 fermetrum í Havn. Eisini er prentvinnan ein vinna, ið hevur verið og er fyri sera stórum tøkniligum broytingum**

PRENT
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Nógv er hent, síðani Jón Hestoy byrjaði Hestprent í leigaðum hølum á Tvøroyri fyri 19 árum síðani. Fyritøkan er farin úr 50 fermetrum á Tvøroyri, til at húsast í 800 fermetrum í Havn. Eisini er prentvinnan ein vinna, ið hevur verið og er fyri sera stórum tøkniligum broytingum.

Søgan um fyritøkuna Hestprent byrjar í 1976, tá ein unglingi á Tvøroyri, nevndur Jon Hestoy, fór til Danmarkar at fylgja sínum dreymi. Dreymurin var at læra til myndamann, fotograf. Fyri at koma so langt, skuldi ein tá fyrst ganga EFG — grafisku linju. Eftir heilar 45 vikur skuldi ein so velja, júst hvørja leið, ið útbúgvingin skuldi ganga innan grafiska heimin.

Jon valdi at læra til prentara. Í summarfrítíðum var hann heima og starvaðist á Sosialinum.

## Prentsmiðja og blað

Í 1983 vendi Jon Hestoy heim aftur at arbeiða. Hestprent sá seinni dagsins ljós á Tvøroyri. Talan var um prent og blaðútgávu, nevniliga lokalblaðið Suðuroyartíðindi.

So við og við gjørdist virkið líka so nógv eitt satsvirkið innan prent. Fyritøkan helt til í leigaðum hølum á Tanganum á Tvøroyri og tá tað var mest, var eitt hálvt starv afturat Jon sjálvum á teimum 50 fermetrunum.

Í 1987 flutti Jon virkið til Havnar.

– Síðani er fyritøkan spakuliga vaksin. Fólk varð sett í starv í 1987 og í 1988 eisini ein lærlingur. Í 1999 fluttu vit so í hølini, har vit nú halda til, greiðir Jon Hestoy frá.

Í 2001 yvitók Hestprent eisini tøkniliga partin av framleiðsluni hjá Sosialinum.

– Hetta var sjálvsagt ein avbjóðing, men tað hevur gingið væl. Og eg haldi báðar fyritøkurnar hava styrki og fyrimun av samstarvinum, sigur Jon Hestoy.

Hestprent leigar eisini niðastu hæddina í blaðhúsinum hjá Sosialinum og hevur bókbindarí. Í dag starvast góð 20 fólk á virkinum.

## Álitið bjargaði okkum

Í nítiárunum herjaði kreppa í Føroyum og hugsast kann, at eitt prentvirki merkir eina slíka væl.

– Frá 1985 gjørdu vit tað, at vit løgdu stóran dent á bøkur. Hetta bjargaði okkum ígjøgnum kreppuna, tí allir aðrir prentlutir nærum hvurvu og vóru burtur, sigur Jon Hestoy.

- Vit royndu at gera arbeiðið bíligt og gott. Vit hava eisini havt prentframleiðslu um nærum allan heim, sigur Jon og leggur dent á, at hóast hetta kann ljóða sum reyp, so er nakað í hesum.

- Vit hava havt ein sera stabilan kundaskara. Har eru størri og smærri kundar. Fleiri teirra eru í dag góðir vinir og fleiri prenta – kanska fleiri ferðir – hjá okkum árliga. Álitið var eisini nakað, ið hjálpti okkum ígjøgnum kreppuna, sigur Jon Hestoy.

- Vit hava eisini havt góð og stabil starvsfólk, sigur Jon og tekur til slagorðið um, at nýggj tøkni og gott, gamalt hondverk, gevur bestu loysnina.

## Steðgur merkir afturstig

Tað er royndur lutur, at innan prentyrkið er sera nógv farið fram innan tøknina. Satsur, off-set og onnur heiti eru komin og farin, síðani tíðina, tá sett var við hond í blýggi. Í dag er nærum alt á teldu.

Jon viðgongur eisini, at ein má vera við upp á tað, ið hendir tøkniliga innan prentyrkið, hóast okkurt vísir seg at halda, annað kanska ikki.

- Steðgur merkir afturstig, staðfestir Jon Hestoy.

Steðga er ikki nakað Hestprent hevur gjørt ofta. Seinasta ár varð byrjað uppá bókbindarí og tá Helgi Justinussen, bókbindari, gavst, keypti Hestprent virkið hjá honum. Í dag er hetta eitt nútímans bókbindarí.

Í ár varð so 4-litað prentmaskina tikin í í brúk og styrkir hetta nógv um møguleikarnar hjá Hestprenti á litprent-økinum.

– Nógv hendir á økinum. Eisini, um ein bara hugsar um tey 19 árini, ið eru liðin, síðani eg byrjaði í leigaðum hølum á Tvøroyri. Tá var eitt hálvt starv og 50 fermetrar. Í dag húsast vit á 800 fermetrum og 20 fólk eru í starvi, sigur Jon Hestoy.




